# Ferð okkara kring knøttin

Á hesum báðum síðunum eru brot úr dagbókum frá okkara fjakkaraferð kring knøttin. Ferðin byrjaði í august og endar ávíkavíst í november og desember.

## FERÐAÆTLAN

Føroyar, Keypmannahavn, London, Los Angeles, Tahiti, Moorea, Rarotonga (Cook Oyggjarnar), Ný Sæland, Avstralia, Bali, Singapore, Maleisia, Teiland, London, Keypmannahavn og Føroyar.



**Navn:** Maria í Brekkunum
**Født:** 24.04.85
**Bústaður:** Eiði

**Mest nýtti luturin í ryggsekkinum:**
- Ullintu hosurnar, sum eg við tógvið stríð bant, áðrenn vit fóru avstað.

**Hvat kundi eg gott verið fyri uttan í ryggsekkinum:**
- Eg havi ALT ov nógv klæðir við. Serliga toppar og trussur. Vaskimaskinur eru hóast alt á hvørjum vallaraheimi.

**Størsti 'kiksari' á ferðini:**
- Enska málið kundi til tíðir verið betri. Fyri nøkrum døgum síðani var eg í einum matvøruhandli og vísti mína ónøgd við kassan: - Excuse me. There's no price on the hill, segði eg, og konan við kassan hugdi sjálvandi spyrjandi.



**Navn:** Sissal Djurhuus Poulsen
**Født:** 01.05.85
**Bústaður:** Tórshavn

**Mest nýtti luturin í ryggsekkinum:**
- Skóleistarnir frá ommu og mítt 'litla ferðaapotek', sum eg mangan havi spælt lækni við.

**Hvat kundi eg gott verið fyri uttan í ryggsekkinum:**
- Ein bók við skemtisøgum, sum kallast 'Humørpiller'. Mamma stakk mær hana í hondina, áðrenn eg fór. Eg havi blaðað í henni eina ferð, og hon er so kavrotin.

**Størsti skrekkur á ferðini:**
- Ein simulator-biltúrur í Universal Studios og grøn, smá fýrbein undir seinngini. Eg græt og illa læt í báðum førum, hóast einki hendi.



*Sólsetur á Moorea. Eitt gott stað at fara, um ein ynskir at kobla frá gerandisdegnum.*



**Navn:** Rannvá Øssursdóttir
**Født:** 08.10.85
**Bústaður:** Tórshavn

**Mest nýtti luturin í ryggsekkinum:**
- Mínar hvítu sandalur við perlum, sum nú eru gular, skitnar og perluleysar.

**Hvat kundi eg gott verið fyri uttan í ryggsekkinum:**
- 150 eingangslappar til pinkubarnarumpur. Eg veit ikki hví, eg havi tikið teir við. Teir fylla alt ov nógv og liggja nú í skrellispannini. Latið ikki konurnar á apotekinum fáa teg at keypa allan heimin, áðrenn tú fert avstað. Apotek eru eisini uttan fyri Føroyar.

**Størsti skrekkur á ferðini:**
- Eg og Lív komu til at tippa eina vesikummu í Los Angeles. Vatnið fleyt út á alt gólvið, og vit vóru í dýrastu neyð. Ikki fyrr enn vaskikonan kom við einum stórum sugviproppi, sluppu vit út aftur.



**Navn:** Lív Højsted Horsdal
**Født:** 18.03.85
**Bústaður:** Hoyvík

**Mest nýtti luturin í ryggsekkinum:**
- Mýggjabitaspreydósin. Hasi flúgvandi beistini elska meg tíverri.

**Hvat kundi eg gott verið fyri uttan í ryggsekkinum:**
- Eg havi fimm tjúkkar og tungar bøkur við, sum eg væl kundi hugsað mær at sloppið undan at borið. Men eg havi longu lisið fýra, so eg veit ikki allikavæl...

**Størsti skrekkur á ferðini:**
- Ein flugustormur á Moorea. Flugurnar vóru allastaðni. í oyrunum, munninum, nøsini, innan fyri buksubrøkurnar... Yllak.



*Í besta Baywatch stíli í Los Angeles*

*Soleiðis sóu vit ut, tá vit komu niður aftur á jarðarflatuna eftir harða og spennandi lopið úr propellflogfarinum.*



